# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Ítróttarliga var einki galið, og í so máta var tað keðiligt, at samstarvið mátti halda uppat, men tað er onnur viðurskifti rundan um, sum gera, at tað ikki ber til* *Jóhan Petur Olgarsson, formaður í TB*

# TB-venjarin koyrdur

**So hevur fyrsti venjarin í ár fingið sekkin. Jan Nielsen og TB hava gjørt av, at samstarvið teirra millum steðgar umgangandi. – Ítróttarliga hava vit einki at finnast at, men tað eru aðrar orsøkir aftanfyri, sigur Jóhan Petur Olgarsson, formaður í TB**



*Í februar tóku Jan Nielsen og Jóhan Petur Olgarsson lógvatak, men nú tríggjar mánaðir seinni er samstarvið slitnað*

**FÓTBÓLTUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jan Nielsen kom úr Danmark til Føroya 1. februar í ár. Hann skuldi hava ábyrgdina av besta liðnum hjá TB. Tað hevur hann eisini havt inntil í morgun, tá hann fekk sekkin í felagnum.

– Vit, nevndin í felagnum og eg, eru komin ásamt um, at samstarvi okkara millum skal steðga, sigur Jan Nielsen úr telefonini úr Suðuroy í morgun. Hann ynskir ikki at koma nærri inn, hvør orsøkin til uppsøgnina er.

– Tað riggaði bara ikki, staðfestir hann.

– Millum leikararnar og meg hevur tað riggað væl, og hvat úrslitum viðvíkur hevur tað eisini verið á eini leið. Men leiðslan og eg hava ikki havt sama stev, sigur Jan Nielsen, sum nú setir leiðina móti Danmark aftur.

### Mugu síggja stuðlar í eyguni

Formaður í TB er Jóhan Petur Olgarsson og vit fingu eisini eina viðmerking frá honum.

– Tað hava verið ávísir samstarvstrupulleikar. Ítróttarliga var einki galið, og í so máta var tað keðiligt, at samstarvið mátti halda uppat, men tað er onnur viðurskifti rundan um, sum gera, at tað ikki ber til, sigur formaðurin í TB, sum ikki ynskir at koma nærri inn á, hvørji viðurskifti talan var um.

– Tað er einaferð soleiðis, at felagið livir av stuðlum og sponsorum, og hesar mugu vit altíð kunna hyggja inn í eyguni, er stutta viðmerkingin frá Jóhan Petur Olgarsson.

### Milan nýggjur venjari

Samstarvið við Jan Nielsen varði í góðar tríggjar mánaðir, men fekk ein bráðan enda. Felagið hevur tó handlað skjótt og fyribilsvenjari er longu settur. Milan Cimburovic, ið hevur havt ábyrgdina av onkrum av yngri deildunum seinastu árini, er maðurin, sum skal hava høvuðsábyrgdina av venjingunum inntil ein møguligur nýggjur venjari er funnin.

## Hondbóltslandsliðið úttikið

Landsliðsvenjarin Magnus Aðalsteinsson og hjálparvenjarin Suni Hansen hava eftir venjingarnar um páskirnar úttikið hesar leikarar til A-landsliðið, sum skal til EM-undankapping á Kypros í døgunum 3. - 7. mai 2007.

Bárður Bendix Mikkelsen, Marienlyst
Rúni Weihe, BK Tromsø
Steinar Eirikstoft, PVC Lyngby
Johan Nielsen, VK Amager
Johan Petur á Stongum, SÍ
Jón Nielsen, Fleyr
Hjalti Josephsen, Mjølnir
Suni Juul Pedersen, Fram
Bartal Eliasen, ÍF
Árni Petersen, ÍF
Ragnar í Haraldsstovu, Fram
Bogi Isaksen, Mjølnir

Jan Hentze verður eisini við á ferðini sum altjóða dómari.

Liðini í kappingini eru annars Kýpros, Luxemburg, Andorra og Føroyar.

Eftir kappingina á Kýpros verður hildið áfram við venjingini til Oyggjaleikirnar, og tá verður aftur byrjað við nýggjum bruttohópi.




# Eli Hentze er ikki meiri enn ein maður

*Formulaliðið fyri 3. umfar við Hjalgrím Elttør høgrumegin í álopinum*

Úrslitini Skíris- og 2. páskadag boða frá, at páskirnar hjá B71 vóru góðar. Fýra stig fekk B71 burtur úr útivallar dystunum móti HB og KÍ. Hetta hevur við sær, at B71 nú býtir fjórða plássið í Formuladeildini við GÍ og KÍ. Somuleiðis hava góðu avrikini givið pláss fyri heili fimm B71-arum á teimum báðum Formulaliðunum, vit kunngjørdu í blaðnum í gjár. Á Formulaliðnum fyri 2. umfar vóru Magnus Olsen, Fabio Viera og Símin Rógvi Hansen, og liðið fyri 3. umfar vóru Clayton Soares og Eli Hentze við at manna.

Eingin ivi skal vera um, at plássini á Formulaliðnum vóru fult uppiborin, men á liðnum fyri 3. umfar hava vit helst gjørt Eli Hentze betri enn hann er. Hann hevur fingið pláss á bæði defensiva miðvøllinum og høgrumegin í álopinum. Hetta er sjálvandi ikki rætt. Eli Hentze er ikki meiri enn ein maður, og tað var eitt mistak sum gjørdi, at hann eisini var settur á høgra álopsplássið.

Helst hevði Eli ikki lagt nakað í, at spælt sum áleypari ein dyst ella tveir, men hesin sessur var ætlaður Hjalgrím Elttør hjá NSÍ, sum jú gjørdi tað so væl ímóti Skála 2. páskadag.

Við hesum skuldi mistakið verið rættað, og vit biðja við hesum lesaran, Eli Hentze og Hjalgrím Elttør bera yvir við okkum.

**-rwd**